VÍÐKAÐA FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
MAI - JUNI 2005
SKRIVLIG FRAMSETING

(Myndaeigari: Heini Nygaard)

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 **Herviliga vatnflóðin í Suðurásia**

2 **Mamma mín**

3 **Trúgv, vón og kærleiki**

4 **Peningur og vald**

5 **„Fult er, áðrenn yvir flýtur"**

1

Herviliga vatnflóðin í Suðurásia

Les tekstin niðanfyri

- Skriva um vanlukkuna

Í tíðindasendingunum var árið í fjør serliga merkt av krígnum í Irak og stríðnum ímóti altjóða yvirgangi, terrorismu. Bæði politikarar og serfrøðingar tóktust samdir um, at í løtuni var hetta ein hin størsta avbjóðingin í heiminum. Men móti ársenda var ein tilburður av heilt øðrvísi slag, ið skakaði allan heimin

2. jóladag i fjør var tað, at náttúran brádliga vísti sína miskunnarleysu og ófatiligu megi.

Ein harður jarðskálvti á botninum í Indiahavi vestan fyri Sumatra gjørdi eina ógvisliga flóðaldu, sum floymdi inn yvir nógvar oyggjar og landaøki og skolaði burtur alt, ið fyri var. Serliga hart raktar vóru Sumatra og oyggjarnar norðanfyri, umframt Teiland, Maleisia, Sri Lanka og India.

Mett verður nú, at fleiri enn 280.000 fólk hava látið lív, umleið 1 millión fólk hava fingið skaða, eini hundrað túsund børn hava mist foreldrini, og at nógvar milliónir fólk hava mist hús og heim.

Altjóða samfelagið fór beinanvegin undir eitt stórt hjálpar- og bjargingarátak. Nógv lond játtaðu hópin av peningi og sendu hjálparfólk, mat og heilivág til vanlukkuraktu økini.

Men flóðaldan hevði gjørt so nógv um seg, at vónleyst var at sleppa til tey harðast raktu økini teir fyrstu dagarnar eftir.

Heimsheilsustovnurin undir ST, WHO, ávaraði beinanvegin um, at stórur vandi var fyri farsóttum, tí at so nógv lík lógu og sløddust allastaðni. Nógvastaðni var vatnið dálkað, og tað kundi fara at krevja líka mong mannalív sum sjálv flóðaldan.

Tyngsta arbeiðið var at eyðmerkja og jarða tey deyðu, hjálpa øllum teimum skaddu og neyðstøddu og at útvega teimum og fólki yvirhøvur reint vatn og mat.

Sambært WHO eru í minsta lagi fimm milliónir fólk rakt av flóðalduni. Mong teirra eru vorðin heimleys og hava mist at kalla alt, sum tey áttu.

Fyrst og fremst ræður um at geva fólki reint vatn, mat og tak yvir høvdið.

Summir serfrøðingar halda, at hetta er ein hin størsta neyðhjálparuppgávan, sum heimssamfelagið hevur havt hesi seinastu árini.

(Sosialurin, 31. desembur 2004)

2

Mamma mín

Les yrkingina

- Skriva eina heilsan í bløðini til mammu tína, sum hevur rundan føðingardag um eina viku
- Møguliga fært tú okkurt hugskot úr hesari yrkingini

Mamma mín

Góða mamma, tú, ið lívið gav mær,
aftur koma barndómsdagar ei,
men tey ljósu minni, eg fekk frá tær,
vilja fylgja mær á lívsins leið.

Mangar mammur syrgnar heima sita,
tí ein sonur gloymdi burtur tær;
men mín góða mamma, tú skalt vita,
at tú stendur hjarta mínum nær.

Meðan tú enn livir, vil eg veita
hesa hjartans heitu tøkk til tín,
og av sonnum skalt tú altíð eita
heimsins besta mamma, mamma mín.

Tá tú burt ert farin, vil tín andi
høgt av himni fylgja míni ferð,
hvar eg sigli, gangi ella standi
veit eg, tú við mína síðu er.

Tá ið lívsins stormar á meg herja,
og eg óttafullur standi her,
veit eg, tú við bønum meg vilt verja,
móðureygað vakir yvir mær.

(Harry Birtilíð, 1927-1991)

3

Trúgv, vón og kærleiki

- Skriva um evnið

4

Peningur og vald

Les tekstin og hugsa um hann

- Lýs, í stuttum, sjónarmiðini i greinini
- Ert tú samd/ur - í øllum, í summum?
- Lýs og grundgev tíni sjónarmið

Mammon, grøni villleiðandi gudur gudanna, herðir sítt ómetaliga vald á bláu klótuni Tellus, og tað tykist ikki vera nakað, ið kann venda gongdini í nærmastu framtíð. Allir aðrir gudar, allar heilagar skriftir, allir profetar, falla til kníggja, glataðir og avmaktaðir, tá ið mammon er í nánd.

Einaráðandi og markleysur í sínum valdi avger hann lagnuna hjá milliónum av menniskjum kring Tellus. Hann rívur skógirnar niður, dálkar heimshøvini, týnir djórasløg, letur børn hungra, førir kríggj í ymsum londum, mennir „klók" vápn, kúgar og pínir menn og kvinnur í heilaga navni Lógar og Reglu Mammons.

Fólkaræði, demokrati, er hugsjón, ið má víkja fyri mammon, tá ið talan er um stórar íløgur ella vinnumøguleikar. Tað sama er galdandi fyri grundleggjandi mannarættindi. Mammon má ikki møta forðingum í sínum ídna virksemi til tess at skapa vøkstur. Menniskju úr øllum londum skulu saman lyfta mammon upp, so at vøksturin verður størri, enn nakar vøkstur nakrantíð hevur verið.

Um ein ikki setur spurnatekin við leiklutin hjá mammon í tilveruni, ikki eigur nakran iva, so er væl einki galið? Um marknaðarbúskapurin, soleiðis sum hann virkar í dag, er „natúrligur", so er væl saktans heldur einki at kjakast um?

Við øðrum orðum eru tað marknaðurin og kapitalurin, ið avgera búskaparligu lagnuna hjá tær og tínum medmenniskjum – ábyrgdin er ikki tín! Øll skulu kappast sínámillum, øll skulu royna at vera fremst, øll skulu ofra sína tíð og orku til at røkka hesum málum, øll skulu trúgva upp á búskaparliga framgongd og vøkstur, ið ger Tellus ríkari, og sum ongan enda tekur.

(Úr grein eftir Firous Gaïni: „Mammon í mæti" í Dimmalætting 28. januar 2005, tillagaður tekstur)

mammon (niðrandi hebraiskt orð): pengar; ríkidømi; jarðiskt góðs

Tellus (latínskt orð) : gongustjørnan Jørðin

(Mynd av Mammon)

5 „Fult er, áðrenn yvir flýtur”

- Skriva um evnið

„Fult er, áðrenn yvir flýtur”